# Á telduskeiði við Gjógv



*Gjáarfólk eru á telduskeiði í skúlanum hvørt mikukvøld. Hóast tey einki kenna til tøknifrøði frammanundan eru tey sera spent*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Gjáarfólk eru farin at læra seg at brúka telduna. Níggju tilkomin fólk ganga á skeið einaferð um vikuna**

TØKNIFRØÐI
*Edvard Joensen*

Tey læra at tendra og sløkkja. Tekna og finna røttu teknini. Og hava tað sera stuttligt.

Tað er longu ljós í skúlanum við Gjógv, tá bilurin hjá Sosialinum steðgar uttanfyri mikukvøldið. Tað er fyrsta liðið, sum er í gongd. Tað næsta kemur um ein góðan hálvan tíma.

Tað sita fýra fólk við hvør sína teldu. Tey fara at læra seg at skriva við Word á Windows. Lærarin situr við pultin. Hann vísir á einum skíggja á vegginum, hvussu tey nú skulu gera.

»Flyta tit pílin har yvir, kemur tann bókstavurin fram. Hann skulu tit so gera so stóran.«

Jú, tað gongur fínt. Tey tykjast taka væl við læru. Hjá onkrum gongur tað bara heilt væl, meðan onkur helt, at nú fór hann í so langt, tí her varð alt svart.

Men tað var skjótt, at hann var klárur aftur, og so letur í síðumanninum, at nú var hann liðugur.

»Tað mundi ikki vera við vilja, tú rakti so væl«, flennir hin, sum gjørdi svart í áðni.

Men tað verður byrjað aftur við góðum treysti, og so gongur tað fínt næstu ferð.

Blaðmaðurin fer upp á gólv at taka eina mynd, og beinanveg fara tey at tosa um, hvussu handan man fara at síggja út í Sosialinum í annaðkvøld. Ein luttakari verður beinanveg valdur út til forsíðuna. Tað er ikki at siga, tá soleiðis er, at eldra ættarliðið við Gjógv er farið inn í telduøldina við so nógvari ferð. Forsíðan skal tað vera.

So eru tey øll komin inn í rætta rútin og byrja at tekna strikur. Tað verður so tigandi. Tey sita við tunguni mitt í munninum. Tað ræður um at fáa besta úrslitið.

Og so er aftur galið. Nú varð alt burtur hjá onkrum, og so varð einhvør stuttlig viðmerking frá síðumanninum.

»Á Jeus, sum her varð vorðið«, heldur ein knappliga fyri. »Her bleiv alt so prikkut.«

Men tað heldur lærarin ikki vera so galið. Boð verða givin um at flyta har og har, og so er alt í lagi aftur.

»Hví eru nú knappliga fleiri stavir av sama slag?« vil ein vita.

»Jú«, sigur lærarin, »Tað er tí, at tú heldur sama tastinum niðri alla tíðina.«

Síðumaðurin kveitir yvir á skíggjan hjá hesum, sum fær sama bókstavin fram.

»Ja, tjóðveldskur ert tú, tað vita vit. Tú skrivar so bara E.« Og so flenna tey aftur.

So eru tey komin hagar til, at støddin á bókstavinum skal finnast. Jú, tað gongur fínt, hóast tað kom ein rúgva av tølum. Tað er so bara at velja sær eitt, so er í lagi.

Onkur trýstur á 72, og so verða bókstavirnir øgiliga stórir. Tað var ikki ætlanin. Men so verður trýst á eitt lægri tal, og tá stóð betri til.

Tað gongur ikki so øgiliga skjótt. Hetta er annað kvøldið, tey møta, og eingin hevur sæð slíkt fyrr. So tey taka tað, sum tað kemur. Hugna sær og stuttleika sær ófører. Helst fara tey at læra tað, hóast tey flestu eru komin nakað væl til aldurs. Men við Gjógv verða fólk gomul. Fleiri enn í nakrari arðari bygd eru farin um tey 100 árini. So tey hava góða tíð.

Og áðrenn tey vita av tí, er tíðin knappliga farin, og næsti flokkur stendur í gongini.

# Fleiri fólk ferðast við Maersk Air

**Eisini Maersk Air hevur merkt ta øktu ferðingina um flogvøllin í Vágum í fjør, sigur felagið í tíðindaskrivi**

Næstan 10.000 fólk fleiri ferðaðust við Maersk Air í fjør um flogvøllin í Vágum, enn felagið flutti í fyrraárið. Samlaða talið í 2000 var 55.942 ferðafólk í móti 46.521 í 1999.

Rutustjórin hjá Maersk Air, Keld Moesgaard Christensen, sigur í tíðindaskrivinum, at felagið sjálvandi fegnast um framgongdina og samstundis ásannar, at tað var rætt at innføra tilboðsprísirnar, sum felagið fór undir seinasta vár.

Hann sigur samstundis, at ætlan felagisins er framvegis at koma við nýhugsanum á økinum.

Tilboðsferðir av sama slagi sum í fjør fara eisini í ár at vera at fáa frá Maersk Air, og tær verða, eins og seinasta ár, lagdar uttan fyri háárstíðina.

Eisini verður sagt í tíðindaskrivinum frá Maersk Air, at rutan millum Billund og Vágar framvegis fer at verða flogin. Eisini komandi vetur 2001/2002.

Maersk Air vil fegið styrkja bondini til Føroyar, sigur felagið. Maersk Air hevur havt fleiri føroyingar í starvi, og teir hava roynst væl. Ætlanin er í framtíðini at fáa enn fleiri føroyingar í starv hjá felagnum.

Keld Moesgaard Christensen, rutustjóri sigur:

»Maersk Air hevur í fleiri ár havt dugnaligar føroyingar í starvi hjá felagnum, og vit ætla í framtíðini at økja talið av føroyingum, bæði umborð á flogførunum eins og í øðrum størvum hjá fyritøkuni.«

**ej**

# Gott at onkur sigur frá

**Tað hjálpir væl, at onkur fremmandur kemur soleiðis av og á og sigur frá, hvussu støðan er, heldur keypmaður av Sandi, sum var á økismenningarfundi í Skopun mánakvøldið**

ØKISMENNING
*Edvard Joensen*



*Fremmand eygu ofta síggja møguleikarnar betri enn tey lokalu, sigur Hans Falkvard Hansen, keypmaður á Sandi*

*Mynd: Edvard Joensen*

Økismenningarfundurin í Skopun mánakvøldið var mennandi á tann hátt, at tað altíð er gott við nýggjum impulsum aðrastaðni frá.

Tað heldur Hans Falkvard Hansen, keypmaður á Sandi, sum var á fundinum í Skopun.

Hann fegnast um, at tað koma tveir granskarar úr Klaksvík og seta navn á ymsu viðurskiftini, sum sandoyingar væl kenna, men líkasum ganga framvið dagliga, tí ikki verður so nógv hugsað um tey.

Hans Falkvard Hansen er sannførdur um, at tað, sagt var um at fáa umstøður til yngra fólkið, er púra rætt. Hann hugsar beinanveg um ítróttarmøguleikarnar, sum hann heldur eiga at betrast í Sandoynni. Trupulleikin er her sum so manga aðrastaðni, at ítróttarfelagið er lítið og ikki so peningasterkt. Tí fer alt ov stórur partur av arbeiðsorkuni til at fáa tað fíggjarliga at koyra.

Hinvegin eru tað miðnámsútbúgvingarnar, sum eiga at fáast meira út á ymsu økini, heldur hann. Hann ásannar, sum sagt varð í Skopun, at longri tey yngru eru í økinum, lættari verður at fáa tey aftur.

Men ítróttur og útbúgving byggja sjálvandi einki land einsamøll. Tað er greitt, at onkur vinna skal til, um fólk skal liva í útjaðara økjunum.

Og eisini her vísir tað seg, at fremmand eygu ofta síggja møguleikarnar betri enn tey lokalu.

Rætt er tað, sigur Hans Falkvard Hansen, at tað skulu pengar til at seta virki á stovn, Og viðhvørt kann tað tykjast møtimikið hjá smáplássum at fara undir slíkt. Men so er tað, at lokalu myndugleikarnir eiga at gera møguleikarnar so mikið góðar, at tað verður lokkandi hjá onkrum, eisini fremmandum, at fara undir eitthvørt vinnuligt virksemi.

Á Sandi til dømis, er kommunan spent rættiliga hart fyri fíggjarliga. Tað kemst av havnarlagnum, sigur Hans. Han heldur, at her átti landskassin at borið ein part, tí tað var í grundini tað almenna, sum stongdi táverandi fiskavirki, sum so lá í andaleypi, so at siga, til hesir nýggju menninir komu aðrastðani frá og lótu uppaftur.

Men vóru ikki teir møguleikar, sum havnin hevði skapt her, so kom eingin, vísir hann á. Og so ivast hann ikki í, at bygdin steindoyði.

Hann heldur, at tað kann vera gott við KT vinnu, men tá tosa vit um nøkur fá størv og ikki virki við nógvum arbeiðsplássum. Tey noyðast at halda seg til tað, sum kemur úr sjónum, sigur Hans Falkvard Hansen.

Hann fegnast um ta sonevndu Sandoyarætlanina, sum var við til at gera tað virsemið, sum nú er i oynni, møguligt.

– Tær tríggjar milliónirnar, har vórðu brúktar, vóru væl útgivnir pengar. So kann ein tosa um stuðul ella ikki, sigur hann.



Hollendskur leikstjóri í Klaksvík:

# Málið er eingin trupulleiki

**Caroline Zantonique leikstjórnar føroyskum leiki á enskum, men tað heldur hon ber væl til. Klaksvíkar Sjónleikarfelag er farið undir venjingarnar til leikin Afturgongur, sum Henrik Ibsen skrivaði**

SJÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



*– Eg hevði væntað, at Føroyar vóru eitt sindur meira isoleraðar, enn tær eru. Men tað ber neyvan til at verða heilt isoleraður, soleiðis sum tøknin hevur ment seg, sigur Caroline Zantonique, hollendskur leikstjóri, sum nú starvast í Klaksvík*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

Í farnu viku setti Klaksvíkar Sjónleikarfelag hol á venjingarnar til leik, sum felagið fer at spæla í mars mánaði.

Talan er um ein av kendastu leikunum hjá norðmanninum Henrik Ibsen, og á odda fyri leikinum stendur hollendski leikstjórin Caroline Zantonique.

Hon er komin til Klaksvíkar at seta Ibsen-leikin upp, og hóast hon skal leikstjórna á enskum, metir hon tað ikki verða nakran trupulleika.

– Eg skilji ikki føroyskt til fulnar, hóast eg kenni nógv orð, men tað ber væl til at leikstjórna hóast hetta. Um tú fylgir væl við og lurtar, so veitst tú, um leikararnir skilja tað, sum teir siga, og um teir bera tað fram á rættan hátt, sigur hon.

### Gekkurin er lærari

Caroline Zantonique tosar flótandi enskt, men hon roynir eisini at læra seg nakað av føroyskum.

Ein av lærarunum hjá henni er Gekkurin í Sjónvarpinum.

– Har kann eg læra nógv av tølunum, tí tey verða lisin so týðuliga upp, samstundis sum eg síggi tey. Tað er júst sum ein skúli, sigur hon flennandi.

Caroline var í Føroyum í tríggjar mánaðir í fjør sum ferðafólk, og tað var á hesi ferðini, at hon fekk samband við Klaksvíkar Sjónleikarfelag. Síðani hevur hon samskift eitt sindur við sjónleikarfelagið í Klaksvík, og endin var, at hon kom hendan vegin at leikstjórna.

Fyrsta uppgávan hjá henni sum leikstjóri var í 1993, tá hann var búsitandi í Dublin. Síðani hevur hon havt nógvar uppgávur heima í Hollandi.

### Skrivaði leik tá hon var átta

Áðrenn hon byrjaði sum leikstjóri, var hon leikari.

– Eg byrjaði at spæla sjónleik, tá eg var seks ára gomul, og longu tá eg var átta, skrivaði eg mítt fyrsta leikrit. Tær var ein leikur upp á eina síðu við einum sera moralskum boðskapi, greiðir hon frá.

Í 1989 fór hon á sjónleikarskúla í Utrecht, haðani hon er ættað og uppvaksin.

– Eg havi spælt nógv leikir, men eftir at eg byrjaði sum leikstjóri, havi eg havt minni hug at spæla og betri hug til at leikstjórna, sigur Caroline.

– Tá tú fyrst hevur roynt teg sum leikstjóri, hevur tú ilt við at venja teg aftur til leiklutin sum leikari, tí tú hevur ofta tínar egnu hugsanir um, hvussu leikurin skal spælast, og tær eru ikki altíð tær somu, sum leikstjórin hevur.

### Ibsen avbjóðandi

Leikurin, sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag er farið undir at venja, er ein av teimum best kendu og mest spældu hjá Henrik Ibsen – Afturgongur, sum hann skrivaði í 1881.

– Ibsen er ein av mínum favorittum og tað er spennandi at arbeiða við leikum hjá honum, tí tað verður so nógv sagt millum linjurnar. Tað, sum verður sagt í leikinum, greiðir ikki frá øllum, og tí mugu áskoðararnir eisini lesa millum linjurnar, sigur Caroline Santonique.

Krevur hetta ikki meira av áskoðarunum?

– Jú, tað ger tað kanska, men soleiðis er við Ibsen. Sjónleikur skal heldur ikki bara verða lætt undirhald. Sjónleikur skal eisini fáa fólk at hugsa og seta leikin í samband við sítt egna lív.

### Øðrvísi byrjan

Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur nú vant leikin í meira enn eina viku, og Caroline Zantonique hevur lagt fyri á sín heilt serstaka hátt.

– Vit gera nógv burtur úr at tulka leikin, persónarnar, hendingarnar og súmbolikkin í leikinum. Leikararnir hava spurt meg, hví hetta er neyðugt, tí teir eru ikki vanir við slíkt. Men eg haldi, at tað skal leggjast eitt gott grundarlag undir leikinum, tí tað ger alt so nógv lættari seinni, sigur leikstjórin.

– Tað er umráðandi, at leikararnir til fulnar skilja, hvat tað er, sum fer fram í leikinum, og hvussu teir skulu bera seg at. Eg havi eisini sagt teimum, at tað er týdningarmikið, at teir eru opnir og royna seg, hóast hetta er óvanligt.

# Royndir leikarar

**Tað vera nakrir royndir leikarar í Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sum fara at spæla Ibsen-leikin**

LEIKARAR
*Eyðun Klakstein*

Fimm leikarar eru við í leikinum Afturgongur, sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag nú er farið undir at venja. Talan er um fimm leikarar, sum allir hava fitt av royndum á palli.

Adelborg Linklett er helst mest royndi leikarin av teimum fimm, men eisini Suni Svabo Samuelsen, Jógvan Brim Joensen, Bjarni Ziska Dahl og Eyð Matras hava spælt nógv sjónleik.

Henrik Ibsen hevur skrivað kenda leikin, sum Turið Sigurðardóttir hevur týtt til føroyskt.

Caroline Zantonique úr Hollandi skal leikstjórna, og Edvard Fuglø skal gera pallmyndir.

Leikurin skal eftir ætlan hava frumsýning í Atlantis í Klaksvík leygarkvøldið 10. mars.

# Føroyska ferðin ein onnur

**Hollendski leikstjórin í Klaksvík heldur tað vera fantastiskt, at føroyingar hava so góðar stundir til máltíðirnar**

SAMFELAG
*Eyðun Klakstein*

Hetta er fyrstu ferð, at Caroline Zantonique roynir seg sum leikstjóri so langt heimanífrá, men hon er ikki tikin á bóli av føroyska samfelagnum.

– Her gongur alt nógv seinni fyri seg, enn eg eri von við í Hollandi, men tað er ikki keðiligt fyri tað. Tað er fantastiskt, at fólk kunnu taka sær so góðar stundir til máltíðirnar til dømis, sigur hon.

Hon heldur, at Føroyar eru eitt vanligt vesturlendsk samfelag, sum hevur nógv til felags við Holland.

– Eg hevði væntað, at Føroyar vóru eitt sindur meira isoleraðar, enn tær eru. Men tað ber neyvan til at verða heilt isoleraður, soleiðis sum tøknin hevur ment seg við interneti og øllum øðrum samskifti.